# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Bæði forsetin og varaforsetin fingu meg at siga ósatt fyri fjølmiðlunum, og teir vóru vitandi um tað*
*Scott McClellan*



*Hesin kanadiski hermaðurin í Afghanistan skal hava hjálp frá nógvum afturat, skal NATO ikki tapa bardagan har ímóti Taliban*

# NATO kann tapa í Afghanistan

**Taliban tekur seg fram ímóti Kabul, og skal NATO ikki tapa bardagan í Afghanistan, noyðist verjusamgongan at tvífalda sítt hermannatal har**

Taliban hevur fingið fótin fyri seg aftur nógvastaðni í Afghanistan, og nú taka teir seg støðugt nærri og nærri høvuðsstaðnum Kabul. Tað er niðurstøðan í einari nýggjari frágreiðing, sum stovnurin Senils Council hevur latið úr hondum.

Frágreiðingin sigur, at kreppan í Afghanistan er komin á eitt vegamót. Skal NATO gera sær nakra vón um at vinna bardagan, má samgongan tvífalda hermannatalið, so tað kemur upp á minst 80.000. Annars tapir NATO.

Tá amerikanararnir lupu á Afghanistan í 2001, róku teir tað mesta av Taliban av landinum. Men í fjøllunum á markinum millum Afghanistan og Pakistan hevur rørslan ment seg aftur.

- Taliban hevur ræðið á stórum økjum og hevur fólk í 54 prosentum av Afghanistan. Harafturat vísir tað seg at vera lætt hjá rørsluni at fáa nýggjar limir, sigur Senils Council í nýggju frágreiðingini. Stovnurin leggur afturat, at Taliban hevur lagt seg eftir at brúka somu framferð sum uppreistrarmenninir í Irak við sjálvmorðsbumbum og vegjaðarabumbum. Harafturat tykist rørslan hava trygga fígging til sítt virksemi, og koma pengarnir fyrst og fremst frá rúsevnahandli.

- Spurningurin er ikki longur, nær Taliban tekur Kabul aftur, men nær tað verður. Skal NATO ikki tapa bardagan í Afghanistan, má hermannatalið minst tvífaldast, skrivar Senils Councuil í nýggju frágreiðingini.

# Castro stillar ikki uppaftur

**Kubanski leiðarin seinastu 47 árini stendur ikki á atkvøðuseðlinum, nú val verður í Kuba í januar**

Tá kubansku valhølini lata upp um morgunin tann 20. januar næsta ár, fáa veljararnir ein atkvøðuseðil, sum víkir frá tí, sum tey eru von við. Tí fyri fyrstu ferð í meiri enn 45 ár er eingin Fidel Castro millum valevnini.

Fyrrakvøldið boðaði kubanska stýrið frá, at val verður til tjóðartingið tann 20. januar næsta ár. Samstundis varð kunngjørt, at tann 81 ára gamli Fidel Castro stillar ikki uppaftur. Einki varð sagt um orsøkina, men Castro hevur havt ringa heilsu í seinastuni, og tí hevur yngri bróðir hansara, tann 76 ára gamli Raúl Castro, røkt forsetaembætið teir seinastu mánaðarnar.

At Fidel Castro ikki stillar upp merkir, at hann kann ikki halda fram sum forseti, tí sambært grundlógini skal forsetin vera valdur tjóðartingslimur. Eftir skipanini verða 31 tinglimir valdir í eitt serligt stjórnarráð, sum síðani skipar seg við forsetanum sum ovasta leiðara.



*Fidel Castro hevur havt ringa heilsu í seinastuni, og hann hevur næstan ikki víst seg alment*
*Mynd: Polfoto*

## STUTT SAGT

### Chirac kann kannast

Í Fraklandi hevur ein dómstólur gjørt av, at ákæruvaldið kann fara undir at kanna, um fyrrverandi forsetin Jacques Chirac gjørdi seg sekan í fíggjarligum sviki, tá hann var borgarstjóri í París frá 1977 til 1995. Sambært ákæruvaldinum lat Chirac kommununa rinda løn hjá fólki, sum arbeiddu fyri flokk hansara, og sum tí einki høvdu við kommununa at gera. Skuldsetingin ímóti Chirac er gomul, men ákæruvaldið kundi ikki kanna málið, meðan Chirac var forseti, tí tað hevði verið í stríð við stýrisskipanina.

### McClellan hartar forsetan

Scott McClellan, sum var talsmaður hjá Hvítu Húsunum og George W. Bush, forseta frá 2003 til 2006, skrivar í einari nýggjari bók, at hann bleiv lumpaður til at geva fjølmiðlunum skeivar upplýsingar um, hvussu loyniligar upplýsingar um ein fyrrverandi agent hjá CIA vóru komnar fyri almenningin. Í bókini, sum kemur út til várs, skrivar McClellan, at hann fekk skeivar upplýsingar frá teimum ovastu embætismonnunum í Hvítu Húsunum, og at bæði George W. Bush, forseti og Dick Cheney, varaforseti vóru vitandi um tað. Dana Perino, sum nú er talskvinna hjá Hvítu Húsunum, sigur í einari viðmerking, at forsetin hevur ongantíð biðið nakran bera skeivar upplýsingar.

### Lýggjur vetur

Forsagnir hjá donsku veðurstovuni DMI vísa, at vit kunnu vænta okkum ein lýggjan vetur. Veðurmenninir siga, at desember, januar og februar verða heldur lýggjari enn meðal, og at í Danmark verður meðalhitin 0,5 stig oman fyri meðalhitan í somu mánaðum í tíðarskeiðinum frá 1981 til 2005. Gamalt er, at tað er trupult at meta um veðrið, men DMI ger kortini vart við, at tey seinastu árini hava forsagnirnar hjá stovninum víst seg at halda rættiliga væl.